

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 04 - 2013

# Miðvingur í Grønlandi- Grønlendingar nógv at læra av føroyingum

Stórir møguleikar eru fyri samstarvi millum føroyska og grønlendska vinnu og londini bæði, og Grønland hevur vissuliga nakað at læra av tí, sum føroyingar hava verið gjøgnum, heldur miðvingurin Jóannes Niclassen, sum hevur arbeitt fyri danska fyritøku í Grønlandi seinastu 9 árini. Óhepnar útmeldingar frá politikarum Ein av føroyingunum, sum luttók á vinnuráðstevnuni í Nuuk í vikuni men sum partur av grønlendska bólkinum, er miðvingurin Jóannes Niclassen, sum arbeiðir fyri donsku byggifyritøkuna MT Højgaard í Grønlandi. Oljan.fo tosaði við hann eftir ráðstevnuna og sigur hann, at ráðstevnan var einki minni enn fantastisk og eitt sætt fløvandi upplivilsi ikki minst í kjalarvørrinum á teimum útmeldingunum, sum komu fram undir og eftir valstríðið í Grønlandi. Eg havi sætt at siga verið heilt niðri í kolkjallaranum í eina tíð, eftir tær útmeldingar, sum komu fram frá grønlendskum politikarum undir landstingsvalinum. Og nú Siimut hevur vunnið so stórt, hevur tað milt sagt skapt stóra frustratión og óvissu millum fleiri íleggjarar og leitifeløg. Tað, sum er mest avgerandi fyri feløgini, ið virka í Grønlandi, er at vita, hvørjar karmar tú skal arbeiða undir og helst 20 ár fram í tíðina. Og at hetta eru tryggir karmar. Tvs. at politikararnir skulu lata vera við at hótta til høgru og vinstru um henda og handa skattin. Tað er lætt at toga í hondbremsuna, men at sleppa henni aftur kann taka fleiri ár. Tað er líkamikið, hvør situr við valdinum, tí politiskur og búskaparligur stabilitetur er altavgerandi, sigur Jóannes Niclassen og heldur fram: Men so kom henda stóra føroyska vinnusendinevndin til Grønlands. Og mín eydnubolli í gjár var at hoyra tær føroysku framløgurnar á ráðstevnuni og ikki minst at hoyra, at tingini bera til og rigga, hóast man er lítil. So lagið er í topp aftur, sigur framfýsni miðvingurin og vísir á, at hann á sínum ferðum úti í heimi plagar at siga, at hann nú í 9 ár hevur arbeitt í eini vinnu, sum enn ikki er til í Grønlandi. Stór

menning í Føroyum Vit hava umleið 30 starvsfólk á míni deild, men á ráðstevnuni í Nuuk kom eg eftir, at føroyingar eisini arbeiða í eini vinnu, sum enn ikki er til í Føroyum, og hon hevur ikki verið har øll tey árini føroyingar hava førleikament seg tvs.í umleið 15 ár. Og vit fingu at vita, at tað arbeiða umleið 1000 til 1500 føroyingar í oljuvinnuni kring heimin. Tvs. at føroyingar hava lært nógv av teimum nærum átta brunnunum, sum eru boraðir við Føroyar, og ta vitanina hava teir tikið við sær og troytt úti í tí stóru verð. Jóannes Niclassen, sum hevur drúgvar royndir í Grønlandi og hevur nógv gott at bera bæði fólki og landi, tvíheldur tó um, at høvdu tey har havt allar hesar virknu føroyingarnar í Grønlandi fyri 10-15 árum síðani, so vóru longu nøkur nám í gongd. Oljuna veit eg einki at siga um, tá vit av góðum grundum ikki vita, um hon finst her, sum roknað tó verður við, sigur royndi føroyski verkfrøðingurin og vinnulívsmaðurin eftir vinnuráðstevnuna í Nuuk. Hann heldur, at tað eru stórir møguleikar fyri samstarvi millum føroyska og grønlendska vinnu og londini bæði, og at man í Grønlandi vissuliga hevur nakað at læra av tí, sum førpoyingar hava verið gjøgnum. So tað einasta, sum tørvur er á nú, heldur miðvíkingurin, er, at onkur vil seta pengar í eina námsverkætlan, sum er lønandi. Gestarøðari á Vinnudegnum Jóannes, sum var ein av gestarøðarunum á Vinnudegnum í Føroyum í fjør, eggjaði tá føroyingum at fara til Grønlands at vita, hvørjar uppgávur liggja fyri framman og hvørjr samarbeiðsmøguleikar eru har í framtíðini. Og Vinnuhúsið og Føroya Arbeiðsgevarafelag hava ikki sovið í tímanum. Úrslitið gjørdist ein vinnuferð til Grønlands við umleið 50 føroyskum luttakarum og við løgmanni á odda. Tíðin fer at vísa, hvat fer at koma burtur úr. Einki er at ivast í, at møguleikar fyri samvinnu eru til steðar  spurningurin er bara at fáa eygað á teir og troyta teir. Ein kann siga, at henda vinnuferðin er ein góð byrjan.